smáttur koma fólk saman at práta og hugna sær. Hetta er vanliga eitt runt pláss við steinum, har fólk kann sita niðri.

Seinnapartin kunnu menn í bygdini savnast til at spæla tagega, sum tað eitur í konsomáli. Tað minnir eitt sindur um backgammom. "Brikkarnir" eru smáir steinar. Tað er ógreitt, hvussu nógvir luttaka í sjálvum spælinum, men nógvir hyggja at, fylgja við og hava sínar viðmerkingar til gongdina.

Fólkið er arbeiðssamt. Kemur ein inn í eina bygd í sátíðini, eru øll arbeiðsfør úti á økrunum. Bert børn og gomul fólk eru heima.

Fólkið er fryntligt og blítt, serliga um ein sigur nøkur orð á teirra máli. Konsofólkið hevur sítt egna mál, men hevði ikki skriftmál, tá ið eg kom hagar. Tey eru um 200.000 sum tosað teirra mál. Nú hava tey fingið skriftmál og eisini nýggja testamenti á teirra egna máli. Hetta er stórt framstig.

Tað var ikki nógv av nútímans hentleikum her. Í Konso var tað ein stórhending, tá ið bilur kom fram við. Tá ið vit sóu ella hoyrdu ein bil lupu vit øll út fyri dyr at hyggja, hvør ið nú kemur. Kanska fingu vit post, og tá var frøi á okkum øllum. Vit hoyrdu bilarnar heilar tveir tímar áðrenn teir komu fram.

Menningin í hesum øki hevur gingið sera seint. Tó er nakað hent øll hesi árini, síðan eg kom hagar.

## Ymisk mál hvør sína megin garðin

Konso er eitt rættuliga stórt øki, har tað búgva um 100.000 fólk. Í Bakaule búði tá um 1.500 fólk. Í landspartinum liva amaharar og konsofólk hvørt um annað. Men tey hildu seg fullkomiliga fyri seg sjálvi.

Í Bakaule búðu amaharar. Teir vóru ráðandi fólkið har. Tað var bert ein grótgarður, sum skilti amaharar og konsofólkið. Hesi fólkini skiltu als ikki hvønn annan.

Tá ið marknaður var komu fólk alla staðni frá, og her bar kortini væl til, hóast fólk ikki kundu skilja hvønn annan.

Á marknaðinum var stórt úrval og stórt virksemi. Ein krukkuseljari kom við einum stórum lessi av krukkum. Ein kvinna, sum vildi selja brenni, kom við tí á bakinum. Her komu vevarar við sínum stoffi, smiðir við knívum og spjótoddum, smørseljarar við krukkum av smøri. Onnur seldu egg og grønmeti.

Kjøtsølan fór fram í eini veruligari feskkjøtdeild. Her kundi fáast heilt feskt geitakjøt. Kundarnir hugdu at, meðan geitirnar vóru slaktaðar og sundurlimaðar. Hetta gav trygd fyri feskleikanum,



Konsomaður spinnir á handsnældu



Konsogenta á veg eftir vatni. Tað kunnu vera tímar at ganga

men tað er eisini neyðugt í hesum hitanum, har einki var, sum eitur køliskáp ella frystarí.

Bæði menn og kvinnur ganga í klæðum úr tilfari, sum er gjørt av vevarum á staðnum. Tá ið kvinnurnar skulu pynta seg, lata tær seg í eitt reytt ella blátt høvuðturriklæði, alt eftir dagsins móta, og eina litríka troyggju.

## Flutningur á bakinum

Eftir vegir og gøtur ganga altíð menniskju, og felags fyri tey er, at tey altíð bera okkurt. Tað er, sum um allur flutningur í Konso verður borin. Menninir bera á akslunum og høvdinum, meðan kvinnurnar bera á bakinum. Men tað eru kvinnurnar, sum bera tyngstu byrðarnar. Tær bera vatn, brennivið, djóraføði og matvørur. Nógvar kvinnur ganga í tímar eftir vatni. Vanliga fara tær við eini tómari krukku á bakinum til eina vatnkeldu og so við fullari krukku heim aftur til bygdina. Vanliga hava tær ein fetil at hava krukkuna í.

Kvinnurnar savna eisini við til brenni. Tá skal eisini gangast langt. Tær savnað ein stóran bunka, sum tær so taka uppá bakið. Hetta er nógv tyngri enn ein kann ímynda sær.

Men hóast tað er strævið eru tær altíð blíðar.

## Trúgvin

So er tað trúgvin í hesum økinum. Har eg kom, var fólkið animistar. Tey trúu uppá andar. Eingin hevði fortalt teimum um Jesus. Tey tilbiðja fossar, steinar, slangur og tílíkt. Tá ið tey komu framvið trø, smurdu tey smør uppá træið og løgdu kaffi og annað niðurvið. Tey boyggja seg framyvir og biðja um, at andarnir í trænum vilja leiða tey rætta leið og vera hjá teimum.

Tey óttast nógv, og tað er bert evangellið, sum kann loysa tey frá óttanum. Tey hava so nógvar siður, sum eg eisini kom at kenna frá klinikkini, har eg arbeiddi. Har kom nógv fólk, og tey høvdu allar møguligar sjúkur. Har vóru nógvar barnasjúkur og eygnasjúkur. Smábørnini fingu ofta leyst lív og spýggju. Tá fer øll vætan út úr kroppinum, og so hava tey ta sannføring, at tey endiliga ikki mugu drekka. Tá blívu tey verri, og so doyggja tey.

Ein annar siður er við hornatonnunum í undirmunninum. Um tey halda, at hesar koma fram ov tíðliga, grópa tey tenninir fram við onkrum, sum tey hava fyri hondina, til dømis okkurt petti av jarni. So kemur bruni í, og nógv doyðu av tí. Tá ið tey hava nógvan fepur skóru tey úlvin í hálsinum. Tey kundu tá bæði bløða út ella fáa bruna í sárið, og tey doyðu eisini av tí. So nógv av okkara arbeiði var at siga fólkinum, at hetta máttu tey ikki gera, og hvussu ringt hetta var. Tey nikkaðu og lovaðu, at hetta skuldi ikki verða gjørt aftur. Men tað skuldi meira til enn so. Tey fóru heim og gjørdu júst tað sama aftur.

## Fekk pening fyri at taka heilivág

Kortini høvdu tey álit á okkum. Eg havi hoyrt um tann fyrsta norska trúboðaran sum kom til Gidole um 50 km norðanfyri Konso, og har kom eg seinni at arbeiða. Hann slapp ikki at geva tann heilivág, sum fólkið hevði brúk fyri, tí tey vóru so rædd. Men so rindaði hann fyrstu sjúklingunum pening fyri at taka heilivágin. Men tá ið tey sóu, at tað hjálpti, var leyst og liðugt.

Hvønn morgun høvdu vit andakt uttanfyri klinikkina. Tá komu nógv fólk. So lósu vit úr Bíbliuni á amarinja, og talaðu Guds orð til teirra. Hetta mál mátti eg so læra meg. Men tað mátti umsetast til konsomálið. Tað var altíð tørvur á minst einum tolki. Viðhvørt tveimum. Tað kom eisini fyri, at tað var brúk fyri trimum, tí tað vóru jú fólk úr so ymiskum fólkasløgum, sum komu til okkara.

So sungu vit kristnar konsosangir og bóðu faðirvár. Hetta vóru sangir, teir sjálvir høvdu yrkt.



Konurnar hava størstu byrðurnar

Nógv vóru analfabetar, men hetta var eingin trupulleiki. Sangirnir vóru upp til 35 vers, men tað var eingin trupulleiki at duga teir uttanat.

Klinikkir og skúlar hava verið brúkt sum reiðskap í Guds hond. Summar dagar fór eg út við eini bíbliukvinnu og lærdi tey. Hon var eisini við sum sum tolkur millum konsomálið og amarinja. Vit lærdu tey at seyma og binda eisini og lærdi tey so eisini úr Bíbliuni.

Hjá teimum, sum blivu umvend broyttist lívið. Teirra sjálvsvirði hækkaði. Tey komu í kirkju, og